almannaverkið

Barna- og Útbúgvinarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7 Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 5. januar 2026
J.nr.: 700.K04-0255/25-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv.:

Viðgjørt: Janus Hentze í Stórustovu

Viðv. uppskoti til broyting í dagstovnalógini

Almannaverkið hevur tann 28. november 2025 móttikið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt til viðmerkingar.

Endamálið er at dagføra lógina umframt m.a. at greina ábyrgdarbýtið millum land og kommunur.

Almannaverkið vil í hesum sambandi viðmerkja, at lógaruppskotið ikki viðger markamótið millum land og kommunur – og hvør tekur avgerð í teimum málunum. Almannaverkið metir, at verandi lógargrundarlag er heldur ógreitt, tá kommunur og Almannaverkið ikki eru samd um hvørt eitt barn eigur at verða fevnd av dagstovnalógini ella fáa tilboð sambært almannalógini.

Almannaverkið hevur í skrivi dagfest 24. november 2025 til táverandi Almanna- og Mentamálaráðið víst á tey viðurskifti, ið áttu at verið endurskoðað. Almannaverkið hevur somuleiðis á fundi við Barna- og Útbúgvingarmálaráðið í november í fjør víst á avbjóðingar, tá ivamál eru. Almannaverkið hevur mælt til, at ein nevnd sum t.d. markamótsnevndin, verður sett at taka avgerðir í ivamálum millum land og kommunur.

Almannaverkið mælir til eina endurskoðan av ásetingunum um nær eitt barn eigur at fáa tilboð um pláss sambært § 5 í dagstovnalógini. Hetta inniber samstundis, at § 39, stk. 3 í almannalógini verður endurskoðað og broytt samsvarandi.

Uppskotið viðvíkir annars ikki virkseminum hjá Almannaverkinum, og tískil hevur Almannaverkið ikki fleiri viðmerkingar.

Vegna Almannaverkið

Janus H. í Stórustovu
fulltrúi